# 6 ára gomul hoyra ikki til í skúlanum

**SKÚLI OG BØRN** Stovnsleiðari ávarar ímóti at senda 6 ára gomlu børnini í føroyska fólkaskúlan. - Tað er at gera seg inn á børnini, sigur Asta í Toft, leiðari fyri Miðstovnin í Gundadali

Rigmor Dam

Asta í Toft man vera millum tey fakfólkini her á landi, sum veit mest um børn í innskúlingsaldri. Aftan á 14 ár sum leiðari fyri Miðstovnin í Gundadali, sum er barnagarður og frítíðarskúli fyri børn millum 5 og 11 ár, hevur hon nomið sær drúgvar royndir, holla vitan og avgjørdar meiningar um, hvørji tilboð vit eiga at bjóða júst hesum aldursbólki.

**» - Í løtuni eru karmarnir í skúlunum ein beinleiðis hóttan móti menningini hjá børnum!**

Tá kjakið nú hevur tikið seg upp um, at Føroyar, eins og mong onnur framkomin lond, skulu senda børnini í skúla sum 6 ára gomul, gjørdi Asta sær sjálvsagt eisini nakrar tankar um hetta.

Og hon er ikki í iva: Skipanin í føroyska fólkaskúlanum hóskar als ikki til 6 ára gomul børn!

- 6 ára gomul børn eru kensluliga á einum vegamóti, har tey eru serstakliga viðbrekin. Tí hava tey tørv á nógvari umsorgan og forstáilsi frá teimum vaksnu, sum eru um tey, staðfestir Asta í Toft, sum Sosialurin hevur sett stevnu.

Hon vísir á, at hennara royndir vísa, at tað er sera stórur munur á børnum, antin tey eru 5, 6 ella 7 ára gomul.

- 5 ára gamla barnið heldur seg vera heimsmeistara. Alt ber til og "eg eri best" er hugburðurin. Men natúrliga menningin ger, at tá barnið verður 6 ár, skramblar øll hendan sjálvsmyndin og heimsfatanin saman, og barnið kemur í eina sálarliga og persónliga kreppu, forklárar Asta í Toft.

Hendan kreppan er eitt tekin um, at barnið hevur funnið útav, at alt snýr seg ikki bara um tað, og tað skal læra seg sjálvt at kenna aftur av nýggjum – eins og ein tannáringur.

- 6 ára gamla barnið kennir hvørki seg sjálvt ella hini. Tað spekurlerar nógv, ber nógvan ótta og humørið er svingandi. Hetta sæst ofta aftur í einum atburði, har barnið, fyri at yvirliva, antin hoverar ella gevur púra upp, sigur Asta í Toft.

Tí heldur hon eisini, at barnið eigur at hava vaksin í nánd, sum skilja og hava tíð til barnið.

- Tað er óamannaverk at senda 6 ára gomul í skúlan, har lærarin ikki kann geva barninum tað, sum tí tørvar. Hann hevur snøgt sagt hevur ikki tíð til tað, sigur Asta í Toft.

### 7 ár og skúlaklár

Hinvegin vísir hon á, at 7 ára gamla barnið er búgvið til skúlan, tí tað er komið til sættis við seg sjálvt aftur. Tað dugur at seta sín egna tørv til viks, og at skilja, at tað kann læra nakað við at venja. Eisini dugur 7 ára gamla barnið at bíða eftir tørni og at taka ímóti boðum.

- Av tí, at 6 ára gamla barnið er á einum vegamóti, hevur tað stóran tørv á at vera saman við 5 og 7 ára gomlum at spegla sær í. Við tey yngru kann barnið spæla rolluspøl og regluspøl, og í eldri vinfólkum finnur 6 ára gamla barnið eina fyrimynd, sum ótilvitað vegleiðir um, hvønn veg tað heila ber.

### Spæla og læra

Her kemur pedagogurin inn á hetta við spæli og læring. Tí hon heldur ikki, at hesi bæði kunnu vera atskild.

- Børn læra av at spæla og tey spæla fyri at læra. Tey kunnu snøgt sagt ikki læra uttan spæl og umvent, sigur hon. Tí ímyndar hon sær eisini, at tað optimala tilboðið til tey 5-11 ára gomlu er ein skipan, har pláss og tíð er fyri spæli. Hetta ber ikki til í verandi skúlaskipan.

Eisini málsliga er tað, sambært Astu í Toft, alneyðugt at halda barnið úr verandi fólkaskúla.

- Skal barnið fáa eina hepna lesitilgongd er neyðugt, at málsliga tilvitið

